## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fleyr til gul av eystri, seinnapartin upp í andøvsgul av landnyrðingi. Sirm ella mjørki, men eisini onkur sólglotti. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av norði og landnyrðingi og regn eitt skifti, annars támut veður. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av vestri og útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 9 og 13 stig.

# Tey byrja tíðliga

**Hesi bæði smáu hava tíðliga brotið upp um armar. Í góðveðrinum ein av døgunum høvdu tey sett sær fyri at økt um formúuna**

HANDIL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Kanska býr ein lítil Ejler Jacobsen, ein Poul Mohr ella kanska ein lítil Ingvør Nolsø í hesum báðu smáu. Í hvussu er tykjast tey tíðliga hava ment ein business-sans – og tey eru heldur ikki bangin fyri at byrja í tí smáa.

Nú um dagarnar kom eitt av starvsfólkunum á Sosialinum framvið hesum báðum, og viðkomandi var kvikur at finna myndatólið fram.

Børnini høvdu gjørt seg væl út. Undir skamlinum sæst ein djúpur borðiskur, so tey høvdu gjørt seg út at verða har eina tíð. Hungurin skuldi so ikki dríva tey til húsar aftur.

Eisini høvdu tey tryggjað sær, at partur av vørunum ikki skuldi fúka burtur í lotinum.

Annars sá út til, at tey høvdu innstillað seg upp á suðurlendskar tilstandir, tí eingi prísskelti vóru at síggja, og tað merkti helst, at tey vóru til reiðar at »prutta« um prísin.

Tað eydnaðist ikki blaðnum at fáa við, hvussu sølan hepnaðist hjá hesum báðum hendan dagin, men tey hava vónandi fingið enn meiri blóð á tonnina at herja á eina aðru ferð.



*Kanska er hetta ein komandi Kitty May Ellefsen ella ein nýggjur Hanus Hansen? Og um ikki, so hugnaðu hesi bæði sær kortini væl við síni »make-shift« sølubúð*
*Mynd: Birgir Waag Høgnesen*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 19 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 19 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 17 |
| Keypmannah. | 17 |
| Helsinki | 21 |
| Moskva | 21 |
| Berlin | 20 |
| Warzawa | 19 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 31 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 26 |
| Róm | 25 |
| Malorca | 31 |
| Athen | 31 |
| Malta | 28 |
| Tunis | 34 |
| Beijing | 31 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 18 |
| New York | 22 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 13 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 987 hPa. vestan fyri Hebridurnar fer spakuliga eystureftir og grynnist. Brúgvalagið við Føroyar verður á okkara leiðum komandi samdøgur.




**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Skotlandi fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið við Føroyar stendur mestsum í stað.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 1/7 kl. $06^{00}$ – 2/7. $06^{00}$. Hitin í gjár: 9,7°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 1/7 kl. $06^{00}$– 2/7 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í juli: 8,0 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 24. juni | Máni ongst frá jørðini |
| 30. juni | Fullmáni |
| 7. juli | Seinna kvarter |
| | Jørðin longst frá sólini |
| 9. juli | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2007

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 3. Juli | 09.44 | 22.06 | 08.44 | 21.06 | 08.59 | 21.21 | 11.44 | - | 00.21 | 12.44 | 07.59 | 20.21 | 06.59 | 19.21 | 09.59 | 22.21 | 10.59 | 23.21 | 09.29 | 21.51 | 10.44 | 23.06 |
| 4. Juli | 10.28 | 22.49 | 09.28 | 21.49 | 09.43 | 22.04 | 00.06 | 12.28 | 01.06 | 13.28 | 08.43 | 21.04 | 07.43 | 20.04 | 10.43 | 23.04 | 11.43 | - | 10.13 | 22.34 | 11.28 | 23.49 |
| 5. Juli | 11.10 | 23.30 | 10.10 | 22.30 | 10.25 | 22.45 | 00.49 | 13.10 | 01.49 | 14.10 | 09.25 | 21.45 | 08.25 | 20.45 | 11.25 | 23.45 | 00.04 | 12.25 | 10.55 | 23.15 | - | 12.10 |
| 6. Juli | 11.51 | - | 10.51 | 23.26 | 11.06 | 23.41 | 01.30 | 13.51 | 02.30 | 14.51 | 10.06 | 22.41 | 09.06 | 21.41 | - | 12.06 | 00.45 | 13.06 | 11.36 | - | 00.30 | 12.51 |
| 7. Juli | 00.26 | 13.00 | - | 12.00 | - | 12.15 | 02.26 | 15.00 | 03.26 | 16.00 | 11.15 | 23.50 | 10.15 | 22.50 | 00.41 | 13.15 | 01.41 | 14.15 | 00.11 | 12.45 | 01.26 | 14.00 |